# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Nobel friðarvirðisløn til Al Gore

Í farnu viku frættu vit, at fyrrverandi amerikanski varaforsetin og forsetavalevni nøkur ár herfyri, Al Gore, hevur fingið friðarvirðisløn Nobels. Henda stóra heiður fær hann fyri sítt slóðbrótandi og miðvísa arbeiði til frama fyri umhvørvinum og friðinum.

Hetta er maðurin, sum í 2000 kappaðist við George Bush um at gerast amerikanskur forseti. Sum flestu kunnugt fekk hann fleiri atkvøður enn Bush, men ein avgerð í hægstarætti hevði við sær, at Gore tapti. Mong halda, at Gore varð snýttur.

Síðani tá hevur hann halgað stríðnum móti dálkingini av jørðini alt sítt lív. Hetta er vorðið til eina sera áhugaverda bók og film um globalu dálkingina m.a. við støði í C02 útláti. Gore hevur ferðast kring alla klótina við sínum boðskapi um eitt reinari umhvørvi, og hetta hevur heilt givið økt um áhugan fyri hesum stóra álvarsmáli.

Nú metti so Nobelnevndin, at hann fyri hetta stóra arbeiði hevur uppiborið at fáa friðarvirðislønina. Hesum kunnu vit bara fegnast um, tí tað kann gera, at spurningarnir, sum Al Gore hevur víst á nettupp fara at verða enn meira í fokus eftir hesa avgerð hjá Nobelnevndini.

Stóri spurningurin er í løtuni, hvat Al Gore fer at brúka hesa virðisløn til. Tað ganga søgur um, at hann møguliga fer at stilla upp til forsetavalið. Eftir okkara tykki eigur Al Gore at halda fram við sínum arbeiði og heldur brúka sína orku, evni og kontaktir til amerikanskan politikk og heimspolitikk sum heild sum maðurin, ið fekk friðarvirðislønina og ikki sum ein komandi amerikanskur forseti. Ta uppgávua eigur hann at lata til Hillary Clinton, sum eisini er sera metvitandi um teir álvarsspurningar, sum Al Gore hevur reist.

Skuldi Al Gore latið seg stilla upp kortini, so vil nakað fara av virðislønini, tí tað kann verða mett, at hann hevur brúkt hetta stríð til at gerast forseti. Og tað kann so forkoma tí áliti hann longu hevur skapt um seg og sína sak. Please dont spoil it. Keep the message and motive pure.

Tillukku til Al Gore og við vón um, at henda virðisløn fer at fáa enn størri fokus á ein reinari og harvið friðaligari heim.

**Sosialurin**

## Eftirskúlin, ið hvarv

**HERÁLVUR JACOBSEN**
Sørvági

Í nøkur ár hava skilafólk arbeitt fyri at fáa ein eftirskúla settan á stovn í Suðri. Her á landi eitur slíkt lokalpolitikkur ella ein desperat loysn at bjarga Suðuroynni. Fleiri við mær halda tó, at hugskotið er frálíkt. Og at skúlin júst skal liggja í Suðri, er ein partur av góða hugskotinum.

Tíggjunda skúlaárið í fólkaskúlanum er so líðandi vorðið ein glæntrileikur. Breytatilboðini, sum skuldu menna og málrætta innihaldið í 10.flokki, virka bara í ávísan mun. Flokkarnir eru ov lítlir og lærarakreftir/førleikar mangla. Tá man í síni tíð innførdi hugtakið eindarskúlan kom eisini ein valskipan, so næmingar í framhaldsdeildini, í størstan mun, kundu velja lærugreinir av áhuga. Ætlanin var at fáa homogenar bólkar, so frálæra á hóskandi støði rakk øllum næmingum. Hendan skipan hevur ongantíð virkað. Eisini her eru flestu eindir ov lítlar. Og kann allur áhugi (manglandi áhugi) yvirhøvur nøktast innan traditionella skúlan? Stórir trupulleikar standast, serliga í eldru árgangunum, har næmingar við ymiskum áhuga og sera ójøvnum førleikum tilvildarliga eru flokkaðir.

Alt fleiri næmingar í 9. flokki eru tí farnir at ivast í, um 10. skúlaárið er ómakin vert. Er hugurin til miðnámsskúlar, so er tað ein loysn, og tað velja fleiri. Men tannárini eru, sum øllum kunnugt, merkt av stórum iva og tvídrátti. Summi velja tí ein eftirskúla. At fara av landinum kann vera mennandi, men sanniliga eisini møtumikið hjá so ungum fólkum. So ein eftirskúli í Føroyum hevði komið væl við.

Vóru nóg høg mál sett, kundi eftirskúlin verið eitt veruligt alternativ til fólkaskúlan. Eg hugsi um góð høli og útgerð, men allarmest um fjøltáttaðar læraraførleikar. Tað kundi verið innan list, margmiðlar, handverk, heimsspeki og mangt annað. Eitt mennandi læruumhvørvi og eitt veruligt tilboð til ungdómar.

Kanska verður trupult at fáa ein breiðan lærarahóp í Suðuroynni, men tað øvugta kann eisini hugsast, at har eru talentir, ið, sum er, ikki hava høvi at royna seg. Fyri næmingarnar (sum ikki eru úr Suðuroy) er fjarstøðan ein forðing fyri at flýggja í skundi, skuldi onkur trupulleiki stungið seg upp. Næmingurin er hjástaddur bæði so og so.

Men nú hava politikkarar stungið halan millum beinini. Teir duga einki endamál at síggja í hesum ætlaða skúla. Tó, býttir eru teir ikki, tí upphæddin teir hóast alt játta til ætlanina er ein táta, sum at enda ger, at arbeiðsbólkurin leggur frá sær. Eitt nógv brúkt og smart triks, tí so kunnu vit framyvir lasta arbeiðsbólkin fyri manglandi ditt og datt. Tað vóru í hvussu er ikki politikkararnir, ið søgdu nei. Ein annar spurningurin er so um fólkaskúlin kann halda fram, sum um einki er broytt.

## Opið bræv til Heðin Mortensen, borgarstjóra

**JÓANNES EIDESGAARD**
Løgmaður



Eg eri samdur við landsstýrismannin í fíggjarmálum í, at fíggjarætlanin hjá Tórshavnar Kommunu ikki er gagnlig fyri konjunkturstøðuna í samfelagnum.

Tað hevur tó ongantíð verið upp á tal við lógar ella politiskum átøkum mótvegis Tórshavnar Kommunu. Eg haldi hinvegin, at vit eiga at formalisera eina skynsama felags fyriskipan av fíggjarligu kørmunum hjá landi og kommunum, ongantíð ov skjótt.

Fíggjarætlanin hjá Tórshavnar Kommunu hevur verið umrøtt á landsstýrisfundi, tó uttan at málið hevur verið at gera lógarinnntriv ella at fremja serlig politiskum átøk.

Eg haldi, at tað er sera umráðandi, at øll fíggjarvirðurskiftini hjá tí almenna verða mett og viðgjørd undir einum. Tí mugu vit sum skjótast fáa eina felags játtanarskipan fyri land og kommunur – lógarfest um tað gerst neyðugt.

## Sambandi setir fokus á eldraspurningin

**Á almennum kjakfundi í Miðlahúsinum týskvøldið, setir Sambandsflokkurin fokus á eldraspurningin**

**POLITIKKUR**
*Tíðindaskriv*

Í okkara vælferðarsamfelag veksur talið av eldri fólki, meðan arbeiðsstyrkin stendur í stað. Hetta er ein avbjóðing sum gerst meira og meira átrokandi at loysa. Longu nú er trupulleiki at sleppa inn á stovnar, heimahjápin røkkur ikki til og fólkapensión til fleiri fólk verður eisini ein fíggjarligur spurningur. Á kjakfundinum í Miðlahúsinum fara Magni Laksafoss, landsstýrimaður og Lisbeth L. Petersen, tingkvinna, at leggja upp til kjak um hesi evni og vísa á avleiðingar og loysnir.

Við sínum politisku royndum tosar Lisbeth um spurningin út frá sjónarmiðnum hjá brúkaranum meðan Magni viðger meira tann fíggjarliga partin, hvussu onnur lond hava loyst spurningin og hvussu vit í Føroyum kunnu skipa okkum.

Kjakfundurin verður í Miðlahúsinum týskvøldið 16. oktober 2007 kl 2000

**Føroya Væl, veljarafelag Sambandsflokksins í Suðurstreymi**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.